# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# DONSK ARROGANSA OG HVALAVEIÐA

Viðhvørt eru danskir politikarar ikki sína uppgávu vaksnir. Hetta gekk sjón fyri søgn í gjár, tá Lene Espersen, uttanríkisráðharri, í samráð í umhvørvisnevndini hjá Fólkatinginum boðaði frá, at Danmark fer at atkvøða ímóti, at føroyingar nakrantíð aftur sleppa at veiða stórhval. Hetta fer Danmark at gera á fundi í IWC, altjóða hvalaveiðinevndini.

Slíka arrogansu frá donskum politikarum hava vit merkt fleiri ferðir fyrr, ikki minst í sváru kreppuárunum í nítiárunum. Tá vístu fleiri ráðharrar í stjórnini hjá Poul Nyrup Rasmussen beinleiðis vanvirðing fyri føroyingum, føroyskum áhugamálum og ríkisfelagsskapinum.

Á fundinum í IWC, sum verður í Marokko um tvær vikur, fer Danmark heldur at lurta eftir sjónarmiðunum hjá ES – og taka undir við, at bannað verður londum, sum ikki veiða stórhval nú, nakrantíð aftur at veiða hval.

At Danmark í onkrum málum setir álitið á ES hægri enn føroysk áhugamál, mugu vit helst liva við. Men legitimiteturin hjá Danmark í hvalaveiðunevndini er júst føroyska hvalaveiðan. Um Føroyar ikki høvdu veitt stórhval, so var Danmark als ikki limur í IWC. Tí er tað serliga arrogant, tá Danmark tekur eina so avgjørda støðu beint ímóti føroyskum og grønlendskum áhugamálum.

Landsstýrið hevur eftir øllum at døma lagt trýst á - og eitt samt løgting stendur saman við landsstýrinum í hesum máli. Fólkatingsmenninir hava helst eisini gjørt sítt – men havandi í huga støðuna hjá Edmundi Joensen sum avgerandi atkvøða hjá donsku stjórnini, so er tað ikki gott nokk, um hann ikki hevur tosað við stórum stavum við Lars Løkke Rasmussen, sum betur enn nakar annar danskur politikari átti at skilt støðuna. Júst hetta vísir enn einaferð, hvussu danskir politikarar kunnu vanvirða føroysk og grønlendsk sjónarmið til tess at vinna sær onkran politiskan sigur



onkra aðrastaðni – hesaferð helst á evropiska meginlandinum, har danska stjórnin frammanundan ikki er so høgt í metum.

Kanska hetta ikki hevur so stóran týdning fyri føroyingar, tí stórhvalaveiða helst ikki er aktuell í fyrstu syftu. Men henda danska avgerðin ber í sær, at føroyingar missa hendan framtíðar møguleikan hjá okkum at taka uppaftur hvalaveiðu á burðardyggum grundarlag. Hetta er ov simpult av donskum politikarum, sum eiga at fáa eina harða ábreiðslu frá føroyskum politikarum. Hetta vísir eisini, at føroyskir fólkatingsmenn einki fáa burturúr at virka sum atkvøðuneyt fyri – í hesum føri – at halda einum borgarligum forsætisráðharra til maktina, sum tá á stendur arrogant svíkir føroysk áhugamál.

**» Vit missa møguleikan til burðardygga hvalaveiðu**




## Rasmus spreyar Miðlahúsið

Í tvær vikur er Live aRt listafestivalurin á skránni á ymsum plássum kring landið. Live aRt er eitt tvørlistaligt tiltak, sum hevur til endamáls at skapa eitt forum millum ymisk fólk og ymiska list og millum okkum og útheimin.

Ein av teimum, sum hevur verið við til tiltakið er danin Rasmus Balstrøm. Hann fæst við sprey máling – onkur vildi kallað tað grafitti. Hann hevur ferðast víðahvar og setti spor eftir seg – og nú ger hann tað eisini í Føroyum.

Hann hevur spreyað eitt grafitti verk á ein vegg hjá Miðlahúsinum í Vágsbotni. Veggurin var eitt sindur merktur av spreymáling, og tí helt Rasmus Blstrøm, at hann tað sama kundi gera eitt ordiligt grafitti verk, og tað fekk hann loyvi til.

Jens Kristian Vang tók eina mynd av danska spreymálaranum og verkinum hjá honum á Miðlahúsinum.



**» So falla gekkaskortarnir**

HØGNI HOYDAL
KJAK Á SÍÐU 12



**» Hugsið heldur um hallið**

BJARNI DJURHOLM
KJAK Á SÍÐU 13

## Ýlitónin køvir kreativitetin

Lokalblaðið Norðlýsið reisir í oddagrein í gjár spurningin, um Sjónvarpið hjá Kringvarpinum ikki átti at loyvt øðrum framleiðarum fram at sendinetinum.

– Stóran part av døgninum sendir Kringvarpið ein ýlitóna og eina grafiska mynd í hvørt heim í landinum. Hetta er sera trupult at skilja, tí tað eru fleiri onnur sum framleiða sjónvarpstilfar, so sum lýsingar, filmar, konsertir, stevnir, kirkjuligir fundir, festivalar og annað, skrivar Norðlýsið í oddagreinini.



– Men hesi sleppa ikki framat í Kringvarpinum uttan at tilfarið fyrst verður góðkent og góðskumett út frá nøkrum sera høgum tekniskum standardum. Úrslitið kenna vit – ein ýlitóni í sjónvarpinum.

Norðlýsið heldur, at Kringvarpið skuldi lækka gáttina nakað og loyvt øðrum at sent tilfar á almenna sendinetinum hjá Sjónvarpinum.

Við at halda fast um útlendskar sendingar, endursendingar og ýlitóna hevur Kringvarpið virkað sum ein dýna oman yvir føroyskum kreativiteti, meðan nøkur útvald hava fingið frítt rásarúm, at koma á tal við alla tjóðina fyri lurtarans rokning. Og tá hesi ikki tíma at senda – verður ýlitóni sendir til tjóðina, skrivar Norðlýsið.

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*